

# – Gerið ok um tit ikki

**Soleiðis sigur Jens Ravn, chefkonsulentur, sum samanber støðuna við Íverksetarahúsinum í Klakvsík, við støðuna hjá lítla danska býin Herning, sum alla tíðina er úti um seg, soleiðis at tey ikki vera yvirhálað av stórbýunum. "Made in Føroyar" eigur at vera eitt góðskumerki, heldur hann**

ÍVERKSETAN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Jens Ravn er chefkonsulentur í Erhversrådet fyri býirnar Herning & Ikast-brande. Hann var í Føroyum í farnu viku í samband við, at fyrsta føroyska íverksetarahúsið sá dagsins ljós í Føroyum. Hann helt ein fyrilestur um íverksetan, og hevur síðani givið Rana Nolsøe, leiðara í Íverksetarahúsinum í Klaksvík, góð ráð um hvussu eitt tílíkt hús verður rikið.

– Vit eru til fyri allar Føroyar. Allir íverksetarar eru vælkomnir at seta seg í samband við okkum. Tað krevst, at tú hevur eina virkisætlan, sum kann vísa, at títt vinnuhugskot eftir øllum at døma er, ella kann gerast burðardygt. Tað er sjálvandi ein fortreyt at tú sjálvur trýrt uppá hugskotið og vil leggja allar orku í tað, segði Rani Nolsøe, við Sosialin í farnu viku, eftir at Íverksetarahúsið hevði havt fyrsta fundin.

Hesum er Jens Ravn fullkomiliga samdur við Rana Nolsøe í. Hann metir at tað er avgerandi neyðugt, at føroyingar standa saman og stuðla nýggja íverksetarahúsinum.

– Alt agg sum einaferð hevur verið millum Klaksvík og Havnina má leggjast á hillina. Tit hava

*– Í Herning vóru vit samd um, at vit máttu gera okkurt serstakt fyri ikki at verða yvirhálað av stórbýunum. Í Føroyum er støðan júst tann sama. Føroyar mugu til at gera okkurt serstakt nú, um tit ikki ynskja at verða yvirhálaði, sigur Jens Ravn*
*Mynd: Høgni Thomsen*

## FAKTA
### Jens Ravn og Birk Estate

Er chefkonsulent í Erhvervsrådet í býunum Herning & Ikast-brande. Hann er leiðari er vinnukontórinum, har høvuðsuppgávurnar liggja innan íverksetan og tænastuveitan av limafyritøkum.
Jens Ravn hevur áður arbeitt við ráðgeving og at finna loysnir í kundauppgávum innan menning, skapan og kunning av vinnugranskan, venjing og útbúgving í mun til útflutnings-marknaðarførslu, og eisini við grundan og rakstur av egnari fyritøku.
Birk Estate, sum Jens Ravn hevur ábyrgdina av, er besta innovatiónshúsið í Danmark um mált verður eftir vøkstri, innovatión, synergi og netverki.

-rwd